almannaverkið

Almanna- og Mentamálaráðið
Eirargarður 2
FO 100 Tórshavn

Tórshavn, tann: 28. okt 2025
AV j.nr.: 221.P20-0019/25

Viðgjørt: Elisabeth Christiansen, eindarleiðari, Janus H. í Funningsstovu, deildarleiðari

Væntaður rakstrarkostnaður fyri Sambýlið við Rygsá á Argjum

Í sambandi við at Almanna- og Mentanmálaráðið greiðir úr hondum verklagslóg ísv. við bygging av nýggja Sambýlinum við Rygsá, er Almannaverkið biðið um at greina rakstrarkostaðin.

Niðanfyri er meting av framtíðarrakstrinum av Sambýlinum við Rygsá. Tað eru altíð óvissur, so sum at fólk gerast verri fyri og koma at krevja hægri normering/ ella umvent. Tað skal tí vísast fyrivarni fyri, at umstøður kunnu broytast fram til, at bygningurin verður tikin í nýtslu.

Tað skal viðmerkjast, at tað eftir ætlan á Sambýlinum við Rygsá, eru íroknaðar útreiðslur, sum ikki hevur verið siðvenja í Almannaverkinum. Her verður serliga hugsað um húsavørð og varaleiðara. Hettar er nærri lýst niðanfyri.

Umskipan av virksemi
Í samband við, at nýggi stovnurin letur upp, steðgar virksemi á trimum stovnum í Tórshavn. Tað er talan um stovnar, sum hava samanlagt 13 pláss.

Tað skal takast fyrivarni fyri, hvør fer at fáa tilboð um at flyta í nýggja sambýlið. Men væntandi verður talan bæði um innanhýsis flytingar frá øðrum stovnum til sambýlið og flytingar av fólkið, sum eru á bíðilista. Tær innanhýsis flytingarnar eru í stóran mun til fólk, sum í dag ikki búgva í hóskandi umstøðum, ella har talan er um faklig atlit. Væntanin er, at 11 fólk, sum í dag ikki hava eitt bútilboð, fáa eitt bútilboð í sambandi við, at stovnurin opnar.

Rakstur
Í Tabel 1 er víst, hvør fígging fylgir við til SVR frá teimum trimum stovnunum í Tórshavn.

Tabel 1: Rakstur sum flytur við til SVR

Sambýlið Rygsá	Pláss	Kostnað
Tríggir stovnar í Tórshavn	13	14.401.000
Verður flutt til Rygsá	**13**	**14.401.000**

Eindarkostnaðurin pr. borgara í miðal á teimum trimum stovnunum vístir omanfyri, er í dag 1,1 mió. kr. pr. pláss pr. ár.

Sum tað sæst í Tabel 2, er væntaður rakstrarkostnaðurin fyri SVR á 19,6 mió. kr. Hettar er ein eindarkostnaður á 0,82 mió. kr. pr. pláss pr. ár. Eindarkostnaðurin er uttan etablering, síðan hettar er ein eingangsútreiðsla. Hesin eindarkostnaðurin fevnir eisini um eina betri tænastu og betri karmar fyri borgaran sum skal búgva á staðnum, nærri lýst at enda í hesum skrivið.

Niðanfyri er væntaðu rakstrarútreiðslurnar til nýggja Sambýlið við Rygsá. Mettur nettokostnaður er á 5,2 mió. kr. árliga.

Tabel 2: Mettar útreiðslur til Sambýlið við Rygsá

Mett útreiðsla Sambýlið við Rygsá 24 borgarar Minka náttarvakt	Tímar pr. ár	Ársverk	Kostnaður pr. ársverk kr.	kostnaður pr. ár kr.
Lønir tímar og tímar pr. ár námsfrøðingar[1]	45.552	21,9	750.000	16.425.000
Varaleiðari		0,5	375.000	375.000
Lønir til vaskifólk 30 timar viku		2	270.000	540.000
Løn køksfólk 30 tímar viku		2	380.000	760.000
Húsavørður		1	650.000	650.000
Rakstur og fyrisiting				894.000
Tilsamans				**19.644.000**
Frátrekt kostnað sambært tabel 1				14.401.000
Mettar netto útreiðslur				**5.243.000**

Viðmerking 1: Í hesum uppskotinum verður normeringin lækkað til námsfrøðingar vegna stórrakstrarfyrimunir. Tað er serliga talan um færri náttarvaktir.
Við í kostnaðinum pr. årsverk er, serstøk frívika, feriuavloysarar og 4% sjúkrafrávera

Afturat kostnaðinum í tabel 2, verður ein eingangsútreiðsla á 660.000 kr. til etablering.

Normering til námsfrøðingar
Væntanin er, at í nýggja sambýlinum kunnu búfólk bólkast eftir teirra tørvi, so at tað verður ein blanding av tyngri og lættari búfólkum í eini eind. Hettar ger, at starvsfólka tilfeingið kann gagnnýtast betur, samstundis sum arbeiðsbyrðan hjá starvsfólkunum verður hóskandi.

Eindirnar koma at vera javnt settar og væntandi koma tað at verða 4 starvsfólk á hvørji hædd til arbeiðis um dagin og kvøldið. Harumframt er væntanin, at tað verður 1 náttarvakt á hvørji hædd um náttina.

Varaleiðari
Eftir ætlan, skal nýggi stovnurin rekast við einum leiðara og einum varaleiðara. Ætlanin er at royna hendan nýggja leistin fyri at tryggja støðugt virksemi á stovninum. Almannaverkið metir, at tað er neyðugt, vegna mongdina av plássum á stovninum, umframt at talan er um ein málbólk við stórum tørvi.

Vaskifólk
Vaskifólk vera sett at vaska bygningin regluliga í gerandisdegnum. Tað verður mett meira fíggjarliga skynsamt enn at nýta veitarar til arbeiðið.

Køksfólk
Tað skal byggjast ein stórkøkur á stovninum, har tað, eftir ætlan, skulu setast fakfólk innan matgerð. At hava útbúgvin kostrøktarstarvsfólk á sambýlum og stovnum í Almannaverkinum er av stórum týdningi fyri heilsu, trivnað og fakliga dygd í arbeiðinum. Fyri borgarar við serligum tørvi hevur rættur kostur beinleiðis ávirkan á kropsliga og sálarligu heilsuna. Ein væl skipaður stórkøkur við fakligari leiðslu og fakligum starvsfólkum tryggjar dygd og skynsaman rakstur. Kostrøktarstarvsfólk tryggja, at maturin er samansettur eftir almennu kostráðunum og tørvinum hjá tí einstaka samstundis, sum stórkøkurin verður rikin á skynsaman hátt, og at máltíðirnir stuðla undir sosialnámsfrøðiliga viðgerð.

Húsavørður
SVR verður millum størstu bústovnar í Almannaverkinum, bæði mált á fermetrar, mongd av plássum og normering av starvsfólkum. Neyðugt er, at tilskila rakstur til húsavørð frá fyrsta degi, fyri at tryggja vælvirkandi umstøður. Áður hevur ikki verið biðið um húsavørð til nýggjar stovnar. Tí er ætlanin, at hesin húsavørður skal stuðla undir húsavaratænastuni á nøkrum stovnum í økinum. Hettar er ein átrokandi tørvur fyri stórar stovnar, og tað er dýrt keypa seg til hesa tænastu aðrastaðni.

Rakstur og fyrisiting
Rakstur til stovnin fevnir um bæði útreiðslur til vanligar vørur, rakstur av starvsfólkum og rakstur av leiðslu og felagsfunktiónum.

Etablering
Hettar er ein meting, sum tekur støði í kostnaðinum fyri etableringsútreiðalunum í Reynstúni. Talan er um innkeyp av, í høvuðsheitum leysum innbúgvi, skrivstovuinnbúgv, búnýti o.s.fr.

Verkstaðstilboð
Í hesum skrivi er tað tikið útgangsstøðið í rakstur uttan verkstað.

Kostnaður pr. borgara áðrenn og aftaná flyting til SVR
Kostnaðurin pr. pláss pr. ár á teimum trimum stovnunum, sum eftir ætlan skulu leggjast niður, er í dag 1,1 mió. kr.

Sbrt. Tabel 2, er væntaður rakstrarkostnaðurin fyri SVR á 19,6 mió. kr. Hettar er ein kostnaður á 0,82 mió. kr. pr. pláss pr. ár. Tað skal eisini havast í huga, at hóast kostnaðurin pr. pláss lækkar, so fer tænastustøðið at hækka munandi. Her er talan um góðar umstøður til borgaran við egnari nútímans íbúð við vesi, egnari inngongd. Harumframt vera umstøðurnar eisini skipaðar betur, við fakfólkið innan reingerð, matgerð og húsavørð.

Tórshavn tann 28. Oktober 2025

_____
Hjørdis Mortensen, almannastjóri
Almannaverkið